**Almannamálaráðið**

# Fíggjarfulltrúi til Almannamálaráðið

Almannamálaráðnum tørvar ein fíggjarfulltrúa at byrja skjótast til ber.

**Sum fíggjarfulltrúi hjá okkum sleppur tú**
- at fáa til vega og viðgera hagtøl á øllum almannaøkinum, fyri at menna leiðslukunningarskipanina í Almannamálaráðnum
- at ráðgeva stovnunum undir Almannamálaráðnum um fíggjarstýring teirra.
- at gera konsekvensútrokningar av lógum og øðrum fyriskipanum á almannaøkinum sum heild

**Førleikakrøv:**
Tú hevur viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni, so sum cand. polit., cand. oecon. ella cand. scient. pol. Eisini hevur tú góðan kunnleika til teldur, og royndir, hug og evni at arbeiða við útrokningum, hagtølum o.s.fr. Tú dugir væl at samstarva, og hevur tú frammanundan kunnleika til almannaøkið, er tað ein fyrimunur.

**Starvið sum fíggjarfulltrúi í Almannamálaráðnum** er áhugavert og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum. Starvið er sjálvstøðugt, og tú fært góðar møguleikar fyri framhaldandi eftirútbúgving.

Fyri framman standa nógvar stórar avbjóðingar viðvíkjandi fíggjarstýringini á almannaøkinum. Til dømis skal nýggj forsorgarlóg tilevnast frá grundini, og skipanin av eldraøkinum stendur fyri stórum broytingum, ið hava við sær fíggjarligar avleiðingar fyri bæði land og kommunur.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal, at setanin fevnir um Almannamálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

**Umsókn** við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:

**Almannamálaráðið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
FO 100 Tórshavn.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 19. juni 2003.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Eyðun M. Hansen, deildarstjóra, tlf. 30 40 50 ella t-post: amr@amr.fo.

*Almannamálaráðið, ið gjørdist sjálvstøðugt aðalráð 1. januar 2003, umsitur almannamál og javnstøðumál. Tað starvast í løtuni 12 fólk í ráðnum. Uppgávan hjá Almannamálaráðnum er í høvuðsheitinum: At ráðgeva landsstýrismanninum í almanna- og javnstøðumálum, at tilevna lógaruppskot, kunngerðir og aðrar reglur, at leggja til rættis fíggjarlógararbeiðið og hava játtanareftirlit við økinum, og at veita stovnum undir ráðnum ráð og vegleiðing.*

**Fiskimálaráðið**
*Fiskiveiðieftirlitið*

# 1. meistarar til Fiskiveiðieftirlitið

Tvey størv sum 1. meistarar við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum verða hervið lýst leys til setan sum skjótast.

**Størvini fevna m. a. um hesar uppgávir:**
- Vaktgangandi maskinmaður sambært ásetingunum frá maskinstjóra
- Skipa fyri og luttaka í dagliga arbeiðinum í maskinrúmunum, og rúmum sum beinleiðis hava samband við maskinrúm, umframt rúm har maskinútbúnaður er
- Skipa fyri viðlíkahaldi sambært viðlíkahaldsskipan
- Annað fyrifallandi viðlíkahaldsarbeiði

**Førleikakrøv:**
- Vinnubræv sum Skipsmaskinstjóri *(STCW-regl. III/2 as Chief Engineer)* ella vinnubræv sum Skipsmaskinmeistari á 1. stigi *(STCW-regl. III/2 as 2nd Engineer)*.
- Heilsuváttan fyri sjómenn
- Leiðsluroyndir
- Góðan førleika at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa

**Setanartreytir:**
Størvini eru tænastumannastørv og lønt í 28. lønarflokki sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið.

Starvsheiti er 1. meistari.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum, vinnubrævi og møguligum viðmælum, skulu verða Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 19. juni 2003 kl. 12.00.

Umsóknirnar skulu sendast til:

**Fiskiveiðieftirlitið**
postsmoga 347
110 Tórshavn.

*Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 35 30 30 og tosa við Elmar Højgaard, deildarstjóra.*

**P/f Jógvan Weihe** Heil- og smásøla

**Ymisk línuútgerð til sølu (brúkt)**

**Av merkinum Sjóvelar hava vit á goymslu í Tórshavn**

1 stk Línuspæl SV. 12 A. 20-40 Tons v/Ísl. rullu etc.
1 stk Egningartrakt
1 stk Uppstokkara S. V. 30
Lína polyester v/svøvlum 5,5 / 6 mm v/12000 E.Z. Húkum nr. 11
Línumagasin - línustokkar etc.

**Útgerðin er á goymslu í Tórshavn, og verður seld eftir avtalu, samlað ella hvør í sær.**

*Staravegur 15 · Tel. 31 38 97 · Fartel. 21 38 97 · Fax 31 38 83*
*Teldupostur: jwimport@post.olivant.fo · heimasíða: www.jogvan-weihe.fo*

Brúkt pool borð til sølu!



8 stk. 3/4 pool borð, av merkinum Riley, vera hervið lýst til sølu fyri ein sámuligan prís - samlað ella hvør sær.

Sí borð á heimasíðu www.rileysure.com

**Sp/f Pool & Billiard**
tel 219848 ella 218240

Sosialurin 341800



# Starvsfólk

## til nýggja barnagarðin og vøggustovuna í Hvalvík

Søkt verður eftir pedagogum og hjálparfólkum til barnagarðin, vøggustovuna og frítíðarbólkin, at byrja 15. august 2003 ella eftir nærri avtalu. Arbeiðstíðirnar eru 30-40 tímar um vikuna.

**Størvini at søkja eru:**
2 pedagogar í barnagarðin, harav annað starvið er fyri pedagog í hurðarhvíld í uml. eitt ár.
3 pedagogar og eitt hjálparfólk í vøggustovuna, ið letur upp eftir summarfrítíðina.
1 pedagogur og eitt hjálparfólk at arbeiða við frítíðarbólkinum.

Barnagarðurin er nýggjur og skipaður við 2 barnagarðsstovum, 2 vøggustovum og einari frítíðarstovu.
Barnagarðurin liggur í hugnaligum, barnavinarligum umhvørvi heilt oman til ta vælkendu stóru ánna, sum er ein natúrligur partur av okkara gerandisdegi.

**Vit ynskja**
At tú hevur hug at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag fyri børnunum.
At tú hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teim vaksnu.
At tú hevur hug til at skapa og seta dám á okkara nýggja barnagarð.
At tú hevur góð samstarvsevni og kann arbeiða sjálvstøðugt.

Um ikki nóg nógv við pedagogiskari útbúgving søkja, verða hjálparfólk sett í størvini fyribils.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Irenu Olsen, leiðara á tlf. 213717 ella 422717.**

**Umsóknir við møguligum avritum av prógvi verða at senda til:**

**Barnagarðin**
Hvalvíkar Kommuna
430 Hvalvík

Umsóknarfreistin er í seinasta lagi tann 21.06.2003.

*Kom ein túr á flogvøllin*



*til tað kalda borðið*
*frá kl. 12.00 til 18.00*
*komandi vikuskifti*

*Kostnaður 80 kr.*

*Cafeteria á flogvøllinum · tel 35 88 10*

Sosialurin 341800

# Starvslýsing

**Søkt verður eftir pedagogum til Vøggustovuna og pedagogum/hjálparfólkum til Barnagarðin við Velbastaðvegin.**

**Søkt verður eftir 2 pedagogum og 1 hjálparfólki til Barnagarðin.**
Arbeiðstíðin er 30 - 40 tímar um vikuna eftir nærri avtalu. Um ongin pedagogur søkir starvið, verða hjálparfólk sett í størvini.

**Søkt verður eftir 2 pedagogum til Vøggustovuna.**
Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna við møguleika at arbeiða fulla tíð. Um ongin pedagogur søkir starvið, verða hjálparfólk sett í størvini.

Øll størvini verða sett 1. august 2003, ella eftir nærri avtalu.

Eisini søkja vit eftir 2 pedagogum til Vøggustovuna at starvast fyri fólk í barnsburðarfarloyvi, at byrja sum skjótast ella eftir nærri avtalu.

Vøggustovan og Barnagarðurin eru sjálvsognarstovnar, sum verða samanlagdir til ein stovn 01.januar 2004, samstundis sum stovnurin gerst kommunalur.
Í hesum sambandi verða bygnaðarbroytingar framdar so tað tá verður *ein* leiðari fyri stovnin og tveir varaleiðarar.
Stovnurin verður umvaldur og bygt verður aftrat verandi bygningi, so bygningurin gerst meiri tíðarhóskandi. Vit hava felags garð og er hann sera góður við náttúrðulendi og tilrættarløgdum øki til okkara børn við nógvum ymsum avbjóðingum.

Tilgongdin við at samanleggja stovnarnar er byrjað og tí vera allir starvsfólkafundir, ráðleggingardagar og skeið hildin felags fyri báðar stovnarnar.

Vit ynskja at finna fólk, ið bæði duga at arbeiða sjálvstøðugt og samstarva. Fólk ið vilja vera við í okkara broytingartilgongd - eisini við nýggjum hugskotum. Fólk ið dáma at brúka náttúrðuna í tí pedagogiska arbeiðinum.

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Føroya Pedagogfelag.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera stovninum í hendi innan 23. juni 2003 kl.12.00.
Viðmerkið í umsóknini, hvat starv tit søkja.
Setanarsamrøður verða 25. og 26. juni 2003.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Monu R. Mohr; leiðara í Barnagarðinum tlf. 314373 og/ella Sólrun Jacobæus; settur leiðari í Vøggustovuni tlf. 314379

**Vøggustovan og Barnagarðurin við Velbastaðvegin**
**Velbastaðvegur 39**
**FO-100 Tórshavn**

**LØGMANSSKRIVSTOVAN**
**Prime Minister's Office**

# Umsitingarleiðari

Starvið sum deildarleiðari í umsitingini á Løgmansskrivstovuni er leyst at seta frá 1. august 2003.

**Starvið**
Umsitingarleiðarin hevur í høvuðsheitum ábyrgdina av:
- Fíggjar- og roknskaparmálum
- Starvsfólka- og lønarmálum
- Skjalaskráseting og øðrum umsitingarmálum
- KT-viðurskiftum
- Ognunum í Tinganesi
- Stovnstrygd

Harumframt skal deildarleiðarin taka sær av búskaparligum spurningum og kunna standa fyri búskaparligum verkætlanum sum til dømis at samskipa einskiljing av fyritøkum landsins.

Umsitingarleiðarin hevur ábyrgdina av menningini á deildini og skal tryggja, at uppgávurnar verða loystar á høgum fakligum støði.

**Faklig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava útbúgving frá hægri lærustovni innan samfelagsvísindi, heruppií búskaparfrøði, ella á øðrum samsvarandi útbúgvingarstigi.

**Persónlig førleikakrøv og royndir**
Umsøkjarar skulu vera væl fyri fakliga, hava vitan um tær treytir, ið eru galdandi í eini politiskari fyrisiting, góð samstarvsevni, vera tænastuhugaðir, miðvísir og duga at arbeiða sjálvstøðugt. Tað er fyrimunur, at umsøkjarar hava arbeiðsroyndir innan tær uppgávur, sum liggja í starvinum, og hava innlit í almennu fyrisitingina. Umsøkjarar eiga harumframt at vera stinnir í føroyskum og enskum máli.

**Løn- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Tann, ið verður settur, skal tola tillagingar og broytingar í starvinum. Setanarøkið fevnir um Løgmansskrivstovuna og hini stjórnarráðini.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, lívsrensli (c.v.) o.ø. skulu vera Løgmansskrivstovuni, FO-100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. juni 2003.

Umsøkjarar eru vælkomnir at venda sær til Marjuna Hanusardóttur, løgmansstjóra, á tlf. 35 10 10, at fáa nærri at vita um starvið.

---

Løgmansskrivstovan styðjar løgmanni í at stjórna landsstýrinum og hevur ábyrgdina av at fyrireika og fremja uppgávurnar, sum løgmaður hevur samsvarandi stýrisskipanini, nevniliga at samskipa og hava eftirlit við landsstýrinum, harumframt fyrisiting og uttanríkismál.

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo